TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:



Á stovninum ganga 40 børn. Seks starvsfólk starvast á stovninum.

## Miðstovnin í Gundadali eftir:

- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 15. august 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Vit bjóða**
Eitt spennandi starv, har viðkomandi kemur at arbeiða við børnum millum 5 og 11 ár. Aktiviteturin á stovninum er skipaður tvørtur um aldursbýti.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Astu Hjelm, leiðara ella Beintu Nattestad, pedagog, tlf. 316042.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Miðstovninum í Gundadali, Gundadalsvegur 6 , FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. juli 2005.



Á frítíðarskúlanum ganga 29 børn úr 1 og 2 fl.

5 fólk starvast á stovninum.

## Frítíðarskúlan Túgvuna eftir:

- einum hjálparfólki at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja 15. august 2005 ella eftir nærri avtalu.
- einum reingerðarfólki at arbeiða 2 tímar um dagin at byrja 15. august 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið sum hjálparfólk verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Starvið sum reingerðarfólk verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Astu Hjelm, leiðara ella Guðrið Nicodemusadóttir, varaleiðara á tlf. 318382.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum Túgvuni, Gundadalsvegur 4, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. juli 2005.



Á frítíðarskúlanum ganga 60 børn. 6 fólk arbeiða á stovninum. Opið er seinrapartar.

## Frítíðarskúlan Smílibýlið eftir:

- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 8. august 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Bjørg Danielsen, leiðara, tlf. 314879 ella 214879.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum Smílibýlið, Stoffalág 82, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. juli 2005.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

---

Toll- og Skattstova Føroya

# Økisstjórar til Toll- og Skattstovuna

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta-, avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina o.a., eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Her starvast 150 fólk.

Planlegging og menning fer fram í Stýrinum, sum heldur til á Argjum. Økisskrivstovurnar kring landið røkja raksturin.

Stovnurin er farin undir bygnaðarbroytingar.

Samstarvið millum økisskrivstovurnar og leiðsluna í Stýrinum skal mennnast, og stovnurin skal veita borgarum og virkjum eina betri tænastu.

Tær núverandi seks økisskrivstovurnar verða lagdar saman til tríggjar.

Fakligi førleikin hjá starvsfólkunum skal mennast, og tí fer man undir at miðsavna fleiri uppgávur, sum higartil hava verið røktar á øllum økisskrivstovum.

Arbeiðast skal fram ímóti at talgilda alt fleiri uppgávur, og eftirlitið skal mennast.

Tær nýggju økisskrivstovurnar vera:
**Norðurøki:** Eysturoy og Norðoyggjar
**Miðøki:** Streymoy, Vágar, Sandoy
**Suðurøki:** Suðuroy

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara
www.tollskatt.fo

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo

Søkt verður eftir tveimum økisstjórum til Økisskrivstovurnar hjá Toll- og skattstovuni, einum til Norðurøki og einum til Miðøki, ávikavist í Gøtu og Tórshavn.
Ætlanin er at seta størvini 1. september 2005.

**Høvuðsuppgávur**
- vera við til at forma nýggja bygnaðin á stovninum saman við stjórnini
- leggja dagliga arbeiðið á økisskrivstovuni til rættis t.d. virkiseftirlit, tolleftirlit, álíkning og innheinting
- gera fíggjarætlan fyri økið
- í samstarvi við deildarleiðararnar í økinum seta mál og stutttíðarplanleggja fyri økið
- í samstarvi við stýrið og hinar økisstjórarnar:
  - planleggja og seta mál fyri stovnin
  - leggja politikk fyri málsøkini, ið stovnurin umsitur

**Ábyrgd av:**
- at uppgávurnar í økinum verða røktar væl og á rættan hátt sambært galdandi skatta-, avgjalds- og innkrevjingarlógum
- at mál verða rokkin
- at fíggjarætlanin verður hildin

**Førleikakrøv**
Tú skal helst hava hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni, ella royndir frá starvi á høgum leiðslustigi. Leiðsluroyndir frá líknandi starvi, herundir starvsfólkaleiðsla, eru fyrimunir.
Tú skalt hava visiónir, góð leiðslu- og samstarvsevni, vera nýhugsandi, málrøkin, ágrýtin og fyrikomandi.

**Setanartreytir**
Størvini verða lønt tilsvarandi deildarleiðara II í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya ella sambært avvarðandi sáttmála.

**Setanarøki**
Setanarøkið umfatar Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Nærri frágreiðing um starvið**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Óla Heinesen, stjóra, ella Arnold H. Nielsen, varastjóra, á tlf. 352600.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi

**8. august 2005**

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Traðagøta 39
Postsmoga 2151
165 Argir


TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ

Vikuskiftisvaktin hjá

SOSIALINUM & PORTALINUM

er at hitta alt vikuskiftið á

TELEFON 22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VAKT

GSM telefonir &

GSM & VHF telefonir v.m
til skip og bátar

Storno
SØLA & TÆNASTA

Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 31 44 14 · Fax 31 80 45
storno@post.olivant.fo

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820

Lesið Sosialin - so eru tit við